




## Elin Brimheim Heinesen

**Gleðir tú teg til tína útgávukonsert í kvøld?**
Heilt ómetaliga nógv. Serliga tí aftanfyri liggur ein sera langdrigin tilgongd. Nú kemur úrslitið so endiliga... fløgan "Yndisløg - Ein ferð aftur í farnar tíðir" við mær og Ad Libitum - og tað hátíðarhalda vit við útgávukonsertini í kvøld kl. 20.30 í Sjónleikarhúsinum.

**Hava tú og manningin í Ad Libitum vant nógv til konsertina?**
Ja, hesar seinastu dagarnar, men ikki so ofta og so leingi, sum vit gjarna vildu.

**Er tað fallið tær lætt at lata útlendskar evergreens í føroyskan málbúna?**
Eitt sindur ymiskt, vil eg siga. Nei, tað er ikki lætt sum heild, men nøkur løg hava verið eitt sindur lættari at týða enn onnur. Men hetta er tó ikki nakað, eg risti úr ermuni.

**Er hetta ein gomul tónleikaætlan?**
Ja, ætlanin er blivin til so líðandi og hevur vaksið seg nógv størri enn upprunaliga hugsað. Fyrsti tankin kom fyri umleið fimm árum síðani, tá mamma mín, Maud Heinesen, doyði av krabbameini. Tá var ætlanin bara at gera nakrar innspælingar í útvarpinum við yndisløgunum hjá mammu og Svenn Brimheim, mammubeiggja mínum, sum eisini hevði krabbamein. Og nú er tað blivin ein heil fløga burturúr, ein konsert - og so ikki minst ætlanin at stuðla Krabbameinsfelagnum við verkætlanini.

# Fuglfirðingar fáa ungan prest

**PRESTASETAN** Kirkjuráðini í Fuglafjarðar prestagjaldi innstillaðu seinasta hósdag Anne Mette Klemensen til starvið sum sóknarprestur. Hon tekur við 1. januar



Randi Jacobsen



Tað er nú greitt, at nýggi presturin í Fuglafjarðar prestagjaldi verður Anne Mette Klementsen.

Tveir umsøkjarar vóru, men bara hon varð innstillað.

Anne Mette Klemensen er dani, men hon skilir og lesur føroyskt, við tað at hon er gift við Leif Hansen úr Nólsoy.

Bæði eru tey tónleikaáhugað. Hann er uguleikari, og hon hevur sungið í kórinum Mpiri.

Hon verður gudfrøðingur í summar og fer síðan á Pastoralseminarið.

Hon tekur við embætinum 1. januar.

*randi@sosialurin.fo*

## Í MORGIN




Fleyr til gul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

## MIKUDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

## HÓSDAGIN




Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn við hvørt. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. í landnyrðing úr Føroyum hvørvur í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Ein veikur hátrýstryggur í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

11. juli Tendring
13. juli Mánin næstur jørðini
18. juli Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. juli | 07:45 | 20:12 | 06:45 | 19:12 | 07:00 | 19:27 | 09:45 | 22:12 | 10:45 | 23:12 | 06:00 | 18:27 | 05:00 | 17:27 | 08:00 | 20:27 | 09:00 | 21:27 | 07:30 | 19:57 | 08:45 | 21:12 |
| 13. juli | 08:37 | 21:03 | 07:37 | 20:03 | 07:52 | 20:18 | 10:37 | 23:03 | 11:37 | - | 06:52 | 19:18 | 05:52 | 18:18 | 08:52 | 21:18 | 09:52 | 22:18 | 08:22 | 20:48 | 09:37 | 22:03 |
| 14. juli | 09:29 | 21:55 | 08:29 | 20:55 | 08:44 | 21:10 | 11:29 | 23:55 | 00:03 | 12:29 | 07:44 | 20:10 | 06:44 | 19:10 | 09:44 | 22:10 | 10:44 | 23:10 | 09:14 | 21:40 | 10:29 | 22:55 |
| 15. juli | 10:19 | 22:44 | 09:19 | 21:44 | 09:34 | 21:59 | - | 12:19 | 00:55 | 13:19 | 08:34 | 20:59 | 07:34 | 19:59 | 10:34 | 22:59 | 11:34 | 23:59 | 10:04 | 22:29 | 11:19 | 23:44 |
| 16. juli | 11:08 | 23:32 | 10:08 | 22:32 | 10:23 | 22:47 | 00:44 | 13:08 | 01:44 | 14:08 | 09:23 | 21:47 | 08:23 | 20:47 | 11:23 | 23:47 | - | 12:23 | 10:53 | 23:17 | - | 12:08 |